gult22 cyan22 magenta22 svart22






*Meðan leikararnir fyrr hava verið noyddir at finna seg í at verða róptir forkelaðir hvølpar, so tykist hugburðurin mótvegis FCK at vera nógv broyttur, nú úrslitini eru góð*

At líta á, hava teir báðir ikki nógv til felags. Annar er hvítur, hin er svartur. Annar er úr Norðureuropa, meðan hin er úr Suðurafrika. Annars er klænur á at líta, hin er hampuliga prúður. Hóast hetta, so hava teir báðir víst seg at rigga sera væl saman. Ov væl vilja flestu verjuleikararnar vera við.

- Zuma. Tað at síggja hann spæla, kanst tú bara njóta. Hann er skjótur og hevur gott eyga fyri spælinum, men eg veit ikki rættiliga, hví tað hevur riggað somikið væl ímillum okkum báðar.

- Vit royndu tað í nøkrum venjingardystum, tað vísti seg bara at rigga. Næsta dystin í vár, var Heine Fernandez so skaddur, og tá spældu vit aftur saman, og tað gekk rættiliga væl. So gingið aftur nakrir dystir, har Heine var við aftur, og ikki fyrr enn seinastu dystirnar, hava Zuma og eg so aftur spælt saman.

- Uppskriftina til, at tað riggar somikið væl, dugi eg í øllum førum ikki siga. Kanska er tað tí, at vit báðir eru skjótir. Vit klára at draga fram við einum manni, og so kanska gera eina avlevering. Eisini tað, at hvørgin okkara er serliga sjálvssøkin haldi eg vera ein fyrimun. Vit vilja gjarna spæla bóltin, um hin er fríur. Tað eru helst fremstu orsøkirnar til hetta.

## Sjálvsálitið nógv at siga

At Todi trívist somikið væl í álopinum nú, kann tykjast at vera eitt sindur í andsøgn til tað, sum hann segði undir einari líknandi samrøðu fyri einum ári síðani.

Tá tóktist alt at ganga betri, eftir at hann av varð fluttur úr álopinum og oman á miðjuna. Tá segði Todi, at hetta frígjørdi hann meira í spælinum, tí trýstið um at skora, ikki var eins stórt á miðvøllinum.

- Tað er nokk tað, at tá mann skorar, og alt gongur væl, so tyngir hetta ikki á sama hátt. Tá eg varð fluttur oman á miðjuna, gekk tað illa hjá mær í álopinum, og tá var tað ein lætti at sleppa av við byrðuna. Eg slapp undan trýstinum í álopinum, og á miðvøllinum slapp eg eisini meira við í spælið. Sjálvsálitið kom aftur, og tá eg so eisini skoraði í fyrstu venjingardystunum í ár, har eg spældi í álopinum, so gekk tað hampuliga væl næstu dystirnar. Um málini koma, so er álopið hóast alt besta plássið at spæla.

## Stuttligt í ár

Hampuliga væl, kann mann helst róliga siga, at hetta árið hevur hylnast hjá Toda. Vit spurdu at enda klaksvíkingin, hvørt tað nú er stuttligari at vera FCK-leikari, enn tað hevur verið hini árini.

- Sjálvandi er tað stuttligari enn nú. Tey árini, sum eg havi verið við, hevur tað als ikki gingið serliga væl. Ofta spældu vit væl, men um tú kortini tapir dysitn, so er eingin, sum minnist til tað. Tað eru úrslitini, sum telja, og meðan vit t.d. vóru nummar seks ella átta, máttu vit so hoyra, at vit bara vóru nakrar forkelaðar hvølpar o.s.fr.

- Nú eru úrslitini við okkum, sjálvt um spælið ikki altíð hevur verið so gott í ár. Fólk eru púrasta garvill, og stemningurin er heilt ótrúligur.

## Framtíðin

Tá hann áður hevur veirð spurdur um framtíðina og møguligar dreymir, hevur Todi alofast svarað, at dreymurin er at koma til Onglands. Skal metast eftir avrikunum, so hevur møguleikin fyri hesum ongan tíð verið betri enn nú, men enn hevur Todi so einki merkt til, at útlendskur áhugi skuldi verið fyri sær.

- Hóast talan helst hevur verið um besta árið hjá mær, so havi eg framvegis havt nógvar skaðar. Í ár havi eg tríggjar ferð verið úti við skaða, og tað er ikki serliga lokkandi.

- Nú kenni eg slettis ikki mítt marknaðarvirði, men um nú eitt felag kanska hevur áhuga í mær, og til dømis skal keypa meg fyri tíggju milliónir, so er spurningurin sjálvandi, um teir vilja taka vágan við einum spælara, sum ofta er skaddur.

Spurdur, um nakrir følarar av nøkrum slag hava verið, sigur Todi, at tað veit hann ikki, og at hann í øllum førum ikki hevur merkt nakað.

- Sjálvandi er dreymurin um útlandið enn til staðar, men hinvegin havi eg tað eisini gott her. Um eg ikki sleppa víðari, so er tað sjálvandi keðligt, men upplivingarnar her hava kortini verið góðar. Eg satsi so uppá, at eg verði her í eini fimm – seks ár afturat, sigur Todi Jónsson at enda.

Δ



*- Nú kenni eg slettis ikki mítt marknaðarvirði, men um nú eitt felag kanska hevur áhuga í mær, og til dømis skal keypa meg fyri tíggju milliónir, so er spurningurin sjálvandi, um teir vilja taka vágan við einum spælara, sum ofta er skaddur*

gult23 cyan23 magenta23 svart23



# Miðlarnir frøast um brakið




*Stórar litmyndir prýddu opnurnar í stóru bløðunum, tá gullbrakið millum FCK og Brøndby varð umrøtt mánamorgunin*

**Donsku miðlarnir vóru fullir av lovprísanum mánadagin, eftir at FCK í einum branddysti hevði tryggjað sær meistaraheitið**

*Álvur Haraldsen/Jákup Mørk – Keypmannahavn*

Danskur fótbóltur hevur ikki upplivað eitt slíkt brak av einum dysti, síðani Lyngby í 1992 tryggjaði sær meistaraheitið, eftir at teir á seinasta leikdegi vunnu á B1903. Tað er helst fremsta orsøkin til, at alt var á gosi undan og eftir dystinum millum FCK og Brøndby.

Við serligum atliti til dreymamálikð hjá Zuma, vóru yvirskriftir sum Zumagi og Løvebrøl at síggja á forsíðunum, og alla staðni var semja um, at FCK átti meistaraheitið uppiborið.

Suðurafrikanski leikarin verður í BT sagdur at hava eitt marknaðarvirði upp á einar 50 mió.kr. eftir dystin, men kortini verður ført fram, at tað neyvan verður í ár, at hann verður seldur nakran veg.

### Hodgson og Østergaard

Umframt Zuma, so verður serliga nógv gjørt burtur úr stjóranum í felagnum, Flemming Østergaard og venjaranum, Roy Hodgson.

Don Østergaard verður hann ofta róptur – vísandi til stóra vald hansara – men mánadagin varð hann kallaður Don Jing, meðan Hodgson varð róptur Guldsmeden, og neyvan var nakra staðni eitt kritiskt orð at lesa um avrikini hjá teimum báðum.

### Rok hjá áskoðarunum

Einasta negativa umrøðan, sum dysturin fekk, mundi vera atburðurin hjá einum minniluta av áskoðarunum, sum einamest nýttu hetta sum eitt forum at berjast í.

Løgreglan noyddist at nýta megi í nógvum førum, og í øllum miðlunum harmast skrivararnir um, at hetta skuldi gerast neyðugt. Breið semja tykist tó vera um, at løgreglan gjørdi eitt sera gott arbeiði hesum viðvíkjandi, og at hon eisini átti sín stóra lut í, at talan hóast alt gjørdist um ein sera stóran dag fyri danskan fótbólt.